Fylgiskjal 7 til útboð um videokervið

# Spurningar og svar

Dagfesting: 24.06.26

| Spurningur nr. | Spurningur | Svar |
|---|---|---|
| 1 | Spurningur til útbjóðingarskjal um videokervið, punkt um undanførleikakrøv – tilvísingar, har tað stendur at *"Tilboðsgevarin skal bjóða eina rakstrarliga trygga og haldgóða loysn. Tilboðsgevarin skal við tilvísingum vísa á, at loysnin er í rakstri, og at loysnin er útbreidd og verður brúkt av kundum, so sum fyritøkum, almennum stovnum og myndugleikum."* Er talan um loysnin skal vera útbreidd í Føroyum? | Nei. Tað er ikki eitt krav, at loysnin er í rakstri og útbreidd í Føroyum. Tað er nøktandi, at loysnin er í rakstri og verður nýtt aðrastaðni. Endamálið við kravinum er at tryggja, at talan er um eina roynda og vælvirkandi loysn, og ikki eina nýggja ella óroynda loysn. |
| 2 | Ert tað eitt krav at loysnini skal verða í Føroyum? Hosted? | Loysnin skal verða hýst í Føroyum í sáttmálatíðarskeiðinum. Endamálið er at tryggja, at dátutrafikkur verður verandi í Føroyum, og at loysnin kann halda fram at virka, hóast sambandið við útheimin verður mist. Tað er tó ikki eitt krav, at loysnin longu í dag er hýst ella tøk í Føroyum. Kravið er, at hetta verður uppfylt í sáttmálatíðarskeiðinum. |
| 3 | Tit (Gjaldstovan) havi bygt eina loysn, hvat merkir tað? Hvat er ment á Vanganum, og hvat umbiða tit í útboðnum. | Tað, sum er ment á Vanganum, er ein umsitingarloysn, sum stýrir, hvørjir luttakarar skulu á fund, hvør fundast við hvønn, og hvat innihaldið í fundarinnkallingini er. Útboðið fevnir hinvegin um eitt videokervi, hvørs uppgáva er at veita atgongd til sjálvan videofundin, herundir fundarleinkjur bæði til gestir (Guests) og fundarleiðarar (Hosts). |

Dagfesting: 13.07.26

| Spurningur nr. | Spurningur | Svar |
|---|---|---|
| 1 | Er tað eitt krav, at tilboðsgevarin sjálvur hevur fleiri samsvarandi videoloysnir í rakstri í Føroyum? | Nei, sí annars svar til spurning 1 frá 24.06.26 |
| 2 | Kunnu tilvísingar hjá einum tøkniligum samstarvsfelaga ella undirveitara telja við í metingini av, um loysnin er nøktandi útbreidd og roynd? | Ja, tøkniligir samstarvsfelagar/undirveitarar kunnu telja við. |
| 3 | Verða tilvísingar frá [dulnevni] í útgangsstøðinum mettar sum viðkomandi tilvísingar í mun til undanførleikakrøvini? | Gjaldstovan tekur ikki støðu til einstakar loysnir ella einstakar undirveitarar fyrr enn at tilboð upp á loysnina er komið. |
| 4 | Kann [dulnevni] bjóða eina loysn, sum verður hýst og rikin í Føroyum av [dulnevni], men har royndirnar og tilvísingarnar til sjálvt videokervið í stóran mun eru hjá okkara samstarvsfelaga? | Ja. |
| 5 | Er [dulnevni], út frá omanfyri nevndu fortreytum, ein viðkomandi og skikkaður tilboðsgevari í útboðnum? | Grundað á, at Gjaldstovan ikki tekur ikki støðu til einstakar loysnir ella einstakar undirveitarar, sí svar til spurning 3 frá 13.07.26, kann hesin spurningur ikki svarast fyrr enn tilboðið er komið inn. |
| 6 | Útboðið liggur mitt í høvuðsferiutíðini, og fleiri av teimum starvsfólkum og samstarvsfeløgum, sum skulu vera við til at fyrireika eitt fullfíggjað tilboð, eru í summarfrí. Ein longd freist hevði gjørt [dulnevni], ført fyri at lata inn eitt gjøgnumarbeitt og dygdargott tilboð.<br><br>Kann tilboðsfreistin verða longd við 14 døgum? | Grundað á feriutíð, vilja vit leingja tilboðsfreistina við 14 døgum. |

Dagfesting: 04.08.26

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Útboðið nevnir: “Capacity shall be defined in terms of concurrent video conferences, with an initial requirement of at least 40 concurrent sessions”. Hvussu verður ein “session” allýst? | Ein session verður allýst sum ein samstundis videofundur (simultaneous call). |
| 2 | Hvussu nógvar fundarluttakarar í hvørjum fundarrúmi skal loysnin kunna handfara? | 20–30 luttakarar. Hetta er fyri at tryggja, at ein lækni kann hava felags undirvísing ella vegleiðing fyri fleiri sjúklingum samstundis. |
| 3 | Hvussu nógvir luttakarar væntast í miðal at vera á hvørjum fundi? | Í miðal 2,2 luttakarar – vanliga ein vertur og ein brúkari og av og á tríggir luttakarar |
| 4 | Er ein væntað go-live-dagfesting? | Væntað verður, at loysnin verður tikin í nýtslu, go-live, í oktober. |
| 5 | Útboðið nevnir, at eitt mobil-SDK skal latast, sum kann brúkast til at integrera við Vangin-appina. Hvørjar pallar skal SDK-ið stuðla? | Eitt **JavaScript-SDK** skal latast, sum ger tað møguligt at intigrera fundarrúmið (Meeting Room) í appina hjá okkum. |
| 6 | Í hesum sambandi: Hvør hevur ábyrgdina av at integrera SDK-ið í Vangin-appina? | Menningartoymið hjá Vanganum fer at standa fyri integratión. Veitarin skal lata eitt klárt forritssavn/bibliotek (SDK), sum kann integrerast í appina. |